# Ov lætt at keypa jørð í Føroyum

**Tað er ongastaðni í heiminum so lætt at fáa hendur á jørð sum í Føroyum. Hetta er ein trupulleiki, útoyggjafólk hava at stríðast við, segði búnaðarfrøðingur á útoyggjafundi í Havn á grækarismessu**

ÚTOYGGJAR
*Edvard Joensen*



*Tóm hús og ósligin bøur síggjast nógvastaðni á útoyggj. Útoyggjafólk hava sjálv part av skuldini fyri, at soleiðis er, segði búnaðarfrøðingurin Gunnar Bjarnason á útoyggjafundi í Havn á grækarismessu. Hann heldur, at útoyggjafólk eru ov góð í sær og seta ov fá krøv*

*Mynd: Edvard Joensen*

Tað er ov lætt at sleppa til jørð í Føroyum, segði Gunnar Bjarnason, búnaðarfrøðingur á útoyggjafundi í Havn í seinastu viku. Tað eiga at liggja treytir við, sum gera, at tann, ið situr við jørðini, eisini skal brúka hana. Tað hevði givið úitoyggjafólki ein betri møguleika at gagnnýtt jørðina, tey bara hava til láns frá øðrum.

Tá tosað verður um viðurskifti á útoyggj, kemur jørð og jarðarbrúk av náturligum ávum ofta ovarlaga á breddan. Soleiðis var eisini hendan dagin á Hotel Hafnia, tá Útoyggjafelagið skipaði fyri evnisdegi um vinnu á útoyggj.

Ein teirra, ið hevði nakra markantar meiningar at bera fram á fundinum, var búnaðaførðingurin Gunnar Bjarnason, sum helt, at útoyggjafólk í ávísan mun sjálv hava skuldina av, at tey ikki frá brúksrætt til ta jørð, tey skuldu verið næst at nýtt.

Tað liggja ongar treytir við at eiga jørð í Føroyum. Tú kanst eiga jørð hvar sum helst og so bara lata hana liggja i órøkt ella til byrðu fyri tann, sum býr á staðnum, vísti búnaðarfrøðingurin á. Men útoyggjafólk seta ov fá krøv og leggja ov fáar treytir við, tá talan er um jørðina, ið liggur til bygdirnar, tey búgva í, segði búnaðarfrøðingurin.

Gunnar Bjarnason vísti til dømi úr Danmark, har fók noyðast at selja jørð aftur, tí tey ikki búgva á staðnum, tey hava keypt. Eitt nú bóndagørðum. Sama átti at verið Føroyum, segði hann. Tað hevði havt fleiri fyrimunir. Eitt var, at fólk, sum átti jørð, skuldi búð á staðnum. Eitt annað var so, at høgi prísurin á jørð í Føroyum hevði lækkað, metti Gunnar Bjarnason. Tí tá hevði tað ikki verið attraktivt at keypt upp jørð sum íløgu bara fyri at goyma pengar, segði hann. Í triðja lagi vísti hann á,at tað, at tað ber til at selja jørð í smáum í Føroyum, eisini dýrkar jørðina munandi.

Tað ber ikki til at reka landbúnað, har tú ikki eigur jørðina sjálvur ella í hvussu er hevur ein góðan leigusáttmála, sum er galdandi yvir longri tíð, vísti Gunnar Bjarnason á.

Fyri at reka lønandi landbúnað er neyðugt við stóum íløgum. Bæði í bygningar og maskinur. Og tað sigur seg sjálvt, at slíkar íløgur ger ein ikki, um ein ikki veit, um bøurin, tú plagar at selja, kanska verður seldur øðrum um ein mánað ella kanska tvey ár.

So tá tosað verður um, at útoyggjafólk ikki hava brúksrætt til jørðina á staðnum og tí ikki fáa rikið líkinda landbúnað, hava tey fyri ein stóran part skuldina sjálv, segði Gunnar Bjarnason á útoyggjafundinum. Tí tey seta ov fá krøv til teirra, sum keypa jørð upp og hava hana liggjandi ónýtta. Bara at gera eina munliga avtalu um at sláa grasið í ár ella so leingi, vit nú halda tað vera hóskandi, er ikki nóg gott. Tað skulu skrivligar avtalur fyriliggja. Og tær skulu helst vera galdandi nógv ár fram í tíðina, so íløgurnar kunnu hava ein møguleika at forrenta seg aftur, staðfesti búnaðarfrøðingurin.

# Hugnaløta á Giljanesi

**Sunnudagin skipar Vágakórið fyri hugnaløtu í skúlahøllini á Giljanesi**

HUGNALØTA

Sunnudagin tann 21. mars klokkan 16.00 skipar Vágakórið fyri hugnaløtu í skúlahøllini á Giljanesi. Ymsik tiltøk verða á skránni.

Tað verður annað enn vanlig kórkonsert, tá Vágakórið um várjavndøgur fer at hava hugnaløtu á Giljanesi.

Sum vera man verður eisini sungið. Og tað verður bæði felagssangur, blandað kór og manskór, sum verða at hoyra.

Felagskórið fer at syngja nakrar kendar, føroyskar vársangir. Manskórið, ið er nýtt, fer at syngja heldur meira blandað. Okkurt amerikanskt Barber Shop lag, onkra svenska fólkavísu, Evert Taube verður at hoyra, og so eisini einar tvær føroyskar heilsur til kvinnuna.

Yrkingarnar á skránni verða ikki bara sungnar hendan dagin, uttan eisini lisnar upp.

Av øðrum undirhaldi verður esiini skipað fyri onkrum skemti, eins og ein kaffimunur verður at fáa á Giljanesi seinnapartin sunnudagin.

Atgongumerkið kostar 50,- krónur.

**ej**

# Rætting

Í grein um útoyggjar í blaðnum týsdagin, er nevnt, at smoltstøðin í Svínoy byrjaði við hálvarari aðru million smoltum.

Hetta er ikki rætt. Teir framleiddu hálvaaðru millión, tá teir stongdu, men byrjðau við 150.000

**blðm.**

# Nógvur romantikkur

**Tá romantisku talurnar eru fjaraðar burtur, eru orðini gloymd uttan av teimum, sum búgva á útoyggj, segði landsstýrismaðurin við innanlandsmálum á útoyggjafundi á grækarismessu**

ÚTOYGGJAFUNDUR
*Edvard Joensen*



*Jógvan við Keldu, landsstýrismaður við innanlandsmálum, var eisini á útoyggjafundi. Hann ætlar sær á rundferð á útoyggj at tosa við fólk um, hvat gerast kann útoyggjum at frama*

*Mynd: Edvard Joensen*

Tað verður ofta meira tosað enn gjørt, segði Jógvan við Keldu, landsstýrismaður við innanlandsmálum, á útoyggjafundinum í Havn. Føgur orð eru nógv, men so títt og knapt, tey eru fjarað burtur, eru tey gloymd. Uttan av teimum, sum búgva á útoyggj, og til fánýtis sita og bíða eftir lyftunum, sum givin eru.

Sjálvur ætlar hann sær á rundferð á útoyggj at vitja fólk og tosa um mál, sum kunnu takast upp og verða til gangs fyri útoyggjarnar. Hann segði seg hava ymisk hugskot, sum hann ætlaði at taka upp, tá hann fór á rundferð sína. Men hann vildi ikki avdúka tey á hesum fundinum, segði hann.

Jógvan við Keldu segði seg hava ringar royndir av at siga ov nógv og segði seg vera úrlatnan av pressuni, tá hann í síni tíð tók stig til sonevndu útjaðarasamgonguna á Løgtingi. Slíka viðferð vildi hann ikki hava aftur, og vildi tí binda um heilan fingur hesaferð, skiltist á landsstýrismanninum.

Annas helt hann, at tað eigur at vera arbeitt meira og ikki bara ráðlagt. Tí sum hann tók til, so ber væl til at ráðleggja seg í hel og einki fáa burturúr.

Hann bað um hjálp frá útoygjafólki til at fáa nakað á skaftið útoyggjunum at frama. Og so skoytti hann skemtandi uppí, at tá hann nú kom at vitja, fekk hann skatans onkran góðan døgurða eisini.

Jú, tað var ikki at ivast í. Døgurða skuldi hann fáa.



# Rundaði milliónina á keiini í Esbjerg

**Champagnuproppurin sprakk, tá 19 ára gamli bilurin hjá danska sølumanninum Knud Thomsen, ið seinastu mongu árini hevur vitjað Føroyar, hevði koyrt eina millión kilometrar**

BILAR
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*



*Knud Thomsen, sølumaður hjá P.Conradsen, doypir bilin í champagnu, eftir at hann hevur rundað milliónina*

– Einaferð segði eg, at vit helst fóru í grøvina saman. Men so galið vóni eg kortini ikki, at tað gongur.

58 ára gamli Knud Thomsen, sølumaður hjá donsku fyritøkuni P. Conradsen, ið seinastu mongu árini hevur vitjað Føroyar tvær ferðir árliga, tosar um bilin hjá sær. Ein Mercedes 300 diesel frá 1985.

5. februar, á keiini í Esbjerg, rundaði bilur hansara eina millión kilometrar.

– Eg hevði frammanundan gjørt av, at tá teljarin skifti frá 999.999 km. til einans nullir, skuldi eg doypa hann í champagne – óansæð hvar eg so var staddur, greiðir Knud Thomsen frá.

So tá sølumaðurin fór heimanifrá í Fredreikshavn henda morgun, har hann fyrst skuldi vitja viðskiftafólk í Hvide Sande og síðan Esbjerg, var champagnefløskan við.

Av berari tilvild hevði viðskiftafólkið hjá honum í Esbjerg júst keypt sær eitt digitalt myndatól, og hesin tók myndirnar av Knud Thomsen, ið doypti bilin í champagnu.

## Sum við menniskjum

Spurdur, hvørji góð ráð hann hevur til onnur, ið vilja hava nógvar kilometrar úr bili sínum, sigur Knud Thomsen skemtiliga:

– Tað er sum við menniskjum, fer tú væl við teimum, so halda tey leingi.

Danski sølumaðurin sigur seg ikki hava havt stórvegis útreiðslur av bili sínum. Einans smærri viðlíkahald.Til dømis varð fjórða útstoytið sett undir bilin herfyri.

Knud Thomsen hevur havt Mercedes bilin í 14 ár. Áðrenn hevði hann verið hýruvognur við 259.000 kilometrum á baki.

Sølumaðurin hevur roknað út, at samanlagt hevur hann nýtt átta arbeiðsár í bilinum. Hann koyrir kring alt Danmark og eisini í hinum Norðurlondunum, og tí gerast kilometrarnir nógvir. Men tá hann vitjar Føroyar stendur bilurin eftir við hús í Frederikshavn.

Hóast aldurin á bilinum og ikki minst mongu kilometrarnar hevur Knud Thomsen ongar ætlanir um at lata bilin frá sær.




*– Tað v ar ein stór løta, tá øll nýggjutølini skiftu til nullir, sigur Knud Thomsen*

Frithleif Olsen:

# Sparikassin fram um fótbóltin

**Frithleif Olsen, ið dagliga er stjóri á FJM í Runavík, er nýggjur nevndarformaður í Føroya Sparikassa. Samtíðis tekur hann seg aftur sum valevni til formann í Fótbóltssambandinum**

NEVNDARVAL
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*

Í seinastuni hevur 44 ára gamli Frithleif Olsen úr Rituvík fyri tað mesta verið settur í samband við formansvalið í Fótbóltssambandinum. Men eftir at aðalfundurin hjá Føroya Sparikassa valdi hann til nýggjan nevndarformann, hevur rituvíkingurin tikið seg burtur úr glímingini við Óla Holm um formanssessin í FSF.

Frithleif Olsen starvast til dagligt sum stjóri í fyritøkuni FJM í Runavík.

Fleiri nýggja andlit eru annars at síggja í nýggju nevndini hjá Føroya Sparikassa eftir aðalfundin síðsta fríggjadag.

Olga Kallsberg og Signa Dimon stóðu báðar fyri vali, og hvørgin teirra ynskti at stilla upp aftur. Í teirra stað vórðu valdir Odd Bjellvåg og Petur Hammer, ið báðir hava havt sæti í umboðsráði Sparikassans.

Starvsfólkaumboðini í nevndini fyri Føroya Sparikassa stóðu eisini fyri vali. Tórmund Joensen og Rakul Dam vórðu afturvald, meðan Bjartur Nolsøe og Gert Langgaard eru nývaldir.

Mánadagin skipaði nevndin seg so við Frithleif Olsen sum formanni og Tórmund Joensen sum næstformanni. Frithleif Olsen avloysir Petur Zachariasen, sum valdi at fara úr nevndini. Petur Zachariasen hevur verið formaður síðan 1994 og nevndarlimur síðan 1990. Hann var við í leiðsluni í 1994, tá gamla sparikassalógin frá 1937 varð avloyst av banka- og sparikassalógini, ið loyvir Sparikassanum at virka sum banki.

Petur Zachariasen segði við Útvarpið á middegi týsdagin, at nevndin í Føroya Sparikassa ynskti ein nýggjan formann, og tí valdi hann at trekkja seg. Annars hevði hann ikki hug at gera aðrar viðmerkingar til málið.

# Tryggingin flytir til Sandavágs

**Tryggingarfelagið Føroyar hevur keypt bygningin hjá Føroya Sparikassa í Sandavági og flytir virksemið sítt úr Miðvági til Sandavágs**

TRYGGING
*Edvard Joensen*




*Tryggingarfelagið Føroyar hevur keypt bygningin hjá føroya Sparikassa í Sandavági og yvirtekur hann 15. apríl*

*Mynd: edvard Joensen*

**Sandavági:** Tryggingarfelagið Føroyar fer at flyta til Sandavágs um ein góðan mánað. Felagið hevur keypt sparikassabygningin í Sandavági og yvirtekur hann 15. apríl.

Avtlan millum Førya Sparikassa og Tryggingarfelagið Føroyar varð undirskrivað fyrapartin týsdagin, sigur Mortan Poulsen, stjóri í Trygingarfelagnum Føroyar. Hann vil ikki upplýsa keypsprísin.

Tryggingarfelagið hevur eina tíð leitað eftir egnaðum hølum í Vágum, tí hølini, felagið helt til í í Miðvági, nøktaðu ikki tørvin, sigur hann. Nú hava tey funnið ein sera væl egnaðan bygning, og hann er so keyptur og flutt verður sum skjótast.

Tað arbeiða tvey fólk soleiðis umleið trýkvart tíð hvør á tryggingini í vágum. Tey flyta við til Sandavágs.